Landssjúkrahúsið
Fo 100 Tórshavn

Sjúkrarøktarfrøðingur til A2 føðideildina

Á føðideildini **A2** er fulltíðar fast starv sum sjúkrarøktarfrøðingur í skiftandi vaktum leyst til setan 1. januar 2004 ella eftir avtalu.

A2 er ein deild við plássi fyri 12 mammum við børnum, 4 barnakonum og einari neonatalari eind, har vit royna, at hvørt einstaka barnið saman við foreldrum fær so góða byrjan sum gjørligt í lívinum. Deildin er spennandi við nógvum avbjóðingum, tvørfakligum samstarvi, góðari upplæring, undirvísing, og hon hevur tilrættislagda innleiðsluætlan. Á deildini eru royndir og virknir starvs-felagar.

Førleikakrøv:
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- faklig vitan og royndir
- góð samstarvsevni
- fleksibul og kreativ/ur
- røkjuskapur
- hug til tvørfakligt samstarv
- vil søkja mennandi avbjóðingar

Setanartreytir:
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Upplýsingar um starvið:
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sólfríða Helmsdal, virkandi deildarleiðara, telefon 31 35 40, lokal 167 ella til Ceciliu Vestureið, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal/kallara 499 ella e-post ceci@lsh.fo

Umsóknarfreistin er 23. desember 2003 kl. 12.00.

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

Landssjúkrahúsið
Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

Finska Aðalkonsulatið

Finskur tjóðardagur 6. desember

Stuðul

Í sambandi við, at finskur tjóðardagur er tann 6. desember, ber til hjá einstaklingum og feløgum at søkja um stuðul og vinnulig, mentanarlig ella ítróttarlig tiltøk og verkætlanir. Samlaði stuðulin, ið latin verður, er kr. 25.000.

Umsókn saman við einari lýsing av tiltakinum/verkætlanini kann sendast til:

Finska Aðalkonsulatið
Hoyvíksvegur 74
100 Tórshavn

Poul Michelsen

7 persóna bilur til sølu

Ein sera væl hildin og væl útgjørdur Honda Stream 1,7 til sølu. Bilurin er frá nov. 2002 og hevur koyrt 14.000 km.

Prísur kr. 210.000,-

Tlf. 214321

Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo

CATERPILLAR

442D RENNUGRAVARI
Fabriksnýggjur
Prísur uttan mvg **kr. 498.000,-**

HYDREMA

908ESD RENNUGRAVARI
Frá 1996 - 5500 tímar - renoverað

906B RENNUGRAVARI
Frá 1991 - 5800 tímar - renoverað
Prísur uttan mvg **kr. 305.000,-**

808 RENNUGRAVARI
Frá 1989 - 5940 tímar
Prísur uttan mvg **kr. 150.000,-**

806 RENNUGRAVARI
Frá 1989 - uml. 6000 tímar
Prísur uttan mvg **kr. 225.000,-**

SELD

P/F ALMA
Maskinverkstaður & Smiðja
Tel 31 58 90 · Fax 31 35 00
Mail: jan@alma.fo

Húsavørður søkist

Hjálp.... Okkara fitti húsavørður gevst at arbeiða hjá okkum, og tískil hava vit brúk fyri einum øðrum fittum húsavørði at starvast hjá okkum frá 1. februar 2004.

Í Sankta Jósefs barnagarði er eitt starv sum húsavørður leyst at søkja 25 tímar um vikuna. At starvast sum húsavørður í einum barnagarði er eitt sera fjølbroytt og spennandi starv.

Arbeiðsuppgávurnar eru fjølbroyttar. Ein av uppgávunum er at halda økið kring barnagarðin viðlíka og annars alt fyrifallandi arbeiði. Vit vænta av umsøkjaranum, at hann er tolin og góður við børn.

Um hetta hevur tín áhuga, so eru tygum vælkomin at søkja starvið. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Louisu Smets, leiðara, á tlf. 312854.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 17. desember 2003 og sendast til:

Sankta Jósefs Barnagarður
Att. Louisa Smets
Varðagøta 12
100 Tórshavn

MIÐVÁGS KOMMUNA

Útibarnagarðurin í Miðvági

søkir við hesum eftir

1 pedagogi á 40 t.

til Útibarnagarðin í Miðvági, at byrja 15. jan. 2004 ella eftir nærri avtalu.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran á tlf. 223429 ella 333738.

Umsóknir vera, saman við upplýsingum um útbúgving, royndum møguligum viðmælum, at senda til Miðvágs kommunu, 370 Miðvágur.

Kommunan skilar sær rætt til, um ikki nøktandi umsóknir eru, at lýsa starvið av nýggjum.

Almennur fyrilestur um ADHD/DAMP og autismu

Í samband við ár teirra brekaðu heldur Christopher Gilberg, professari, almennan fyrilestur við heitinum »Eitt barn í hvørjum flokki – um ADHD, DAMP og autismu« í Læraraskúlahøllini

týskvøldið 9. desember kl. 19.30

Christopher Gilberg er professari í barna- og ungdómspsykiatri við lærda háskúlan í Gøteborg og heimskendur sum granskari innan sambandið ímillum heilafunktión og atferð.

Øll eru hjartaliga vælkomin, men fyri at nevna nøkur, so hugsa vit um foreldur, lærarar, pedagogar, starvsfólk á barnadeildini og psykiatrisku deild, starvsfólk í Sernámsdeplinum, kommunulæknar, heilsusystrar, starvsfólk á Almannastovuni, starvsfólk á sosialinum deildum í kommununum, barnaverndarlimir og lesandi.

Felagið MBD/DAMP
v. Báru Johansen
Autismugransking
v. Ásu Ellefsen og Honnu Kampmann

Nissan Patrol til sølu

2.8 TD S 3D Van, árg. 1999, grønur, sentrallás, el rútar, el spegl, 60.000 km, kr. 190.000,-

Tlf. 315662 ella 261458

Dagrøktari søkist

Søkt verður eftir dagrøktarmammu í tíðaravmarkað starv

frá 1. januar –01. juli 2004

Løn sambært sáttmála.

Umsóknir skulu vera Fuglafjarðar kommunu í hendi í seinasta lagi 18. desember 2003 kl. 15.00.

Áhugað kunnu venda sær til Dagrøktarleiðaran á tlf. 214950.

Umsóknin skal sendast til:

Fuglafjarðar kommuna
Postbox 30 · 530 Fuglafjørður

Skrivstovufólk til Tofta skúla

Søkt verður eftir skrivstovufólki til Tofta skúla at arbeiða hálva tíð.

Arbeiðið umfatar alt vanligt skrivstovuarbeiði.

Umsøkjarin skal hava royndir í skrivstovuyrkinum, duga væl føroyskt og duga at arbeiða sjálvstøðugt.

Starvið verður at seta 15. jan. 2004, ella eftir nærri avtalu.

Meira fæst at vita um starvið, við at venda sær til skúlastjóran Maritu Dalsgaard, tlf. 447332.

Løn:
Sambært sáttmála ímillum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Skrivlig umsókn, saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum, skal verða Nes kommunu í hendi í seinasta lagi **týsdagin 30.12.03 kl. 12.00.**

Nes kommuna

Sjúkrakassalimir í Nes Sóknar Sjúkrakassa

Sagt verður frá, at gjaldshátturin er broyttur frá mánaðarliga til kvartalsliga.
T.v.s. at limagjald kr. 600,- verður at rinda ávikavist í januar, apríl, juli og oktober mánaði.

Mint verður á, at eftirstøðan fyri árið 2003 eigur at verða goldin nú.

Teir limir, ið ikki hava valt lækna, og tey, ið ynskja at skifta lækna frá 1. januar 2004, skulu siga frá nú ella í seinasta lagi 19. desember 2003.

Nes Sóknar Sjúkrakassi
620 Runavík – Tlf. 448129

Limafundur hjá Listafólkasambandið Føroya

9. desember kl. 17.00, verður fundur fyri limum í limafeløgunum hjá LISA.

Fundurin verður í komuhøllini hjá Listasavnið Føroya.

19. februar 2004 er freistin fyri umsóknum um starvsløn hjá Mentanargrunni Landsins, í hesum sambandi verður skipað fyri fundi har nevnd Mentanargrunsins og starvslønarmóttakarar eru til staðar og greiða frá royndum sínum. Eisini verður høvi at koma við spurningum.

Boðið frá luttøku
á tlf. 320197 og 264831

Bilur til sølu

Nissan Patrol, grønur, 5 hurðar, diesel,
árg. mai '99, el-rútar, krók, 7 setur, leður,
koyrt 80500 km, heillakeraður í september '03.

Vinarliga ring **227321**
best eftir kl 18.00